VIÐMERKINGAR

# Vit fáa tað, ið vit biðja um

**Petur í Gong**
*Brúkarasamtakið*

Vit fara til handils uttan at geva okkum far um, hvussu nógv vit í veruleikanum kunnu stýra úrvalinum við okkara keypi. Tað, ið vit keypa, verður fylt inn aftur á handilshyllarnar. Tað, ið vit sálda frá, sáldar handilin vónandi eisini frá.

Ikki tí. Handlarnir royna sjálvandi at stýra okkara keypihugi við at innrætta handlarnir rætt, soleiðis at vit lættliga fella fyri bráðkeypi, og fylla okkum vognin við vørum, sum okkum als ikki tørva. Men um vit anda djúpt áðrenn vit fara innar, og allatíðina halda høvdið ísakalt, ber til at gera eitt tilvitað keyp.

Sum eyka hjálp kann mann skriva sær ein innkeypslista, og bannlýsa øllum fráviki frá listanum. Eitt síðsta góða ráðið ljóðar kanska nakað løgi, men tað riggar. Far ikki svang/ur til handils.

Tá mann er tilvitað/ur um hvat mann ætlar sær at keypa, renur mann seg við hvørt inn í tann trupulleika, at vøran ikki finnist. Hvat er so at gera? Skulu vit bara velja tað næst besta, ella kanska okkurt verri enn tað?

Tey ið keypa á alnótini, ella hava verið úti í heimi, hava óiva onkuntíð fingið stungið eitt spurnarblað frá seljandi fyritøkuni, har spurgt verður um eina rúgvu. Tað snýr seg her um hornasteinin í allari marknaðarføring, at kenna viðskiftafólkið.

Men tá hetta ikki verður brúkt nakað serligt í Føroyum, mugu vit sálvi hjálpa til. Tí loysir tað seg kanska altíð at spyrja eftir vøruni, hóast vit vita, at hon hvørki er at finna í handlinum ella á goymsluni. Tá vit hava spurgt nóg oftani, kemur vøran kanska á handilshillarnar. Vit kunnu altíð vóna.

Sum eitt næsta stig kunnu vit flyta okkum út um okkara egna tørv, og hugsa um umhvørvi og mannarættindi undir framleiðsluni av vøruni. Hetta er eitt ógvuliga stórt og torskilt øki fyri fólk flest, og vit hava tí hug at tveita frá okkum beinanvegin. Hvussu kunnu vit eisini megna at finna runt í øllum hesum.

Men tað er ikki neyðugt at minnast tjúgu ymiskar merkingar her og nú, og alt fyri eitt seta okkum grundiga inn í viðurskiftini hjá barnatrælum í Kina og aðrastaðni. Vit kunnu byrja í heilt smáum. Sum til dømis við tí norðurlendska svanamerkinum. Hetta merkið boðar frá, at vøran er gjørd á ein slíkan hátt, at hon í mest møguligan mun ikki dálkar umhvørvið. Eisini er hetta merkið longu á nógvum vørum í Føroysku handlunum, og er tað tí ikki so torført at finna. Tó eru matvørur, drekkivørur og heilivágur enn ikki umfatað av merkingini.

Blóman, ið er tað tilsvarandi merkið hjá ES, hevur framgongd, men er enn ikki so vanlig á okkara leiðum.

Nú farast skal til kassan at gjalda, mugu vit ferðast gjøgnum vandaøki. Góðgætishillarnar. Fyri at sleppa til kassan slepst ikki uttan um hesar hyllarnar, og er tí ikki so nógv annað at gera enn at hyggja beint fram, og halda kós og ferð. Um børn er við, hjálpir kanska at hála húgvuna hjá tí niður um eyguni, og at hava barnið sitandi í vogninum. Kanska okkurt klistur fyri munnin eisini hevði gjørt mun.

Sum áður sagt, so er tað ikki nú, tað skal rumbla í búkinum. Hvørki hjá tær ella barni.

Um tú ert ónøgd/ur við, at góðgætishillarnar standa við kassan, kundi tú kanska sagt hetta við onkran, sum arbeiðir í handlinum. Hvør veit? Kanska verða tær fluttar í onkran krók aftast í handlinum, um nóg nógv fólk siga frá.

Men hví skulu vit gera okkum so nógv stríð burtur úr einum handilstúri? Hví ikki bara bara fylla vognin við tí fyrsta og bíligasta, ið vit renna okkum fram á?

Tað er tí at umhugsni gagnar okkum sjálvum. Ein tilvitaður virkin brúkari, ið setur krøv, og allatíðina roynir at fáa sum mest av tí røttu vøruni fyri pengarnar, styrkir um kappingina, og far harvið skapt hægri góðsku, eitt breiðari úrval og lægri prísir. Tí tað eru vit, sum sita við valdinum. Vit mangla bara at brúka tað.

# Eitt ár seinni!

**Bill Justinussen**
*løgtingsmaður*

Fyri góðum ári síðani fór eitt stjórnarskifti fram í Føroyum. Breiða samgongan gjørdist veruleiki. Nú var neyðugt at hava ein sterkan meiriluta á Føroya Løgtingi, tí smølu samgongurnar við bert einum tingfólki í meiriluta kundu ikki brúkast.

Hvørji eru so politisku brøgdini, breiða og sterka samgongan hevur framt hetta árið?

- 2 fíggjarlógir við risahalli
- skattalætti til tey vælbjargaðu
- ómenniskjaligur ágangur móti útlendingum
- vinnupolitikkur uttan úrslit og uttan mál og mið
- ein suðuroyarætlan, sum minnir mest um nýggju klæði keisarans
- ein Hovs(a)-loysn fyri miðnámsskúlan í Suðuroynni, sum setir kílar í heldur enn savnar suðuroyingar um felagsloysnir
- framvegis ongar einskiljingar
- partapolitiskur almannapolitikkur
- ongin loysn fyri rækjuflotan
- fullkomin ruðuleiki í fullveldismálinum, hóast _málið" skuldi loysast eftir hálvum ári, og so skuldi vera friður á økinum
- familjumálaráðið niðurlagt, tí ongin familjupolitikkur er



VAL05

Listin er munandi longri. Enn sakni eg fólkaheilsuætlanina. Enn er ílegugranskingar-uppskotið, sum var liðugt smíðað fyri einum ári síðani, ikki komið á tingborð. Enn bíða vit eftir fiskapakkanum. Enn skulu bólkar setast at kanna alt og onki. Enn situr bólkurin, sum skal arbeiða við yvirtøku av fólkakirkjuni og ger arbeiðið umaftur. Og nú fyrsti tingfundur í nýggja árinum er farin afturum, er bert eittans mál borið niðan í tingið frá landsstýrinum, eitt ríkislógartilmæli um altjóða revsidómstól. Ikki kann sigast, at stóra, sterka og stinna samgongan hevur nógv upp á hjarta í hesum tíðum, nú føroyska samfelagið hevur tørv á sterkum leiðarum.

Tó má eg nevna, at Samanleggingarráðið (fyrr Mentamálaráðið) er einasta ráðið, sum veruliga hevur fingið vind í seglini. Hvørjum allar samanleggingarnar av stovnum fara at enda við, veit neyvan nakar, og hvørjir stovnar næstu ferð verða samanlagdir, veit neyvan nakar heldur.

Tað undrar meg og nógv onnur, hví tað var so umráðandi hjá hesum trimum flokkum at finna saman, tá teir hava so lítið upp á hjarta. At Løgtingið undantikið 2 mál hevði reint borð um ársskiftið, og at bert eitt mál er lagt fram eftir ársskiftið, kundi givið eina ábending um, at fleiri av ætlaðu málunum hava tungt við at finna vegin niðan í Løgtingið. Væl veit eg, at umsitingin er skerd, og tessvegna framleiðir minni enn ynskiligt er, men hóast hetta átti landsstýrið at havt fleiri mál til framløgu. Um ikki, haldi eg, at projektið við breiðari samgongu alt meiri gerst ein táta fyri hvønn dag, sum fer.

Nú eitt ár seinni mugu veljararnir hjá hesum flokkum vera harmir um tey ússaligu úrslit, sum spurdust burturúr. Undanfarna samgonga, sum við Miðflokkinum vann seinasta val, fekk dygga álitisváttan, men frásegði sær upplagda møguleikan at halda fram vegna persónsstríð. Um ikki "vend kemur í" heilt skjótt, verður skjótt aftur tíð til stjórnarskifti í Føroyum.

Miðflokkurin er tilreiðar.

# Stendur tú á sama lista sum Tobbi?

**Tjóðveldisflokkurin hevur boygt nøkur prinsipp. Men størsta prinsippið av øllum er, at veljarin sleppur at tala**

**Sjúrður Skaale**



VAL05

Stendur tú á sama lista sum Tobbi? Hvussu ber tað til? Hevur flokkurin ikki viðtikið, at maðurin skal koyrast úr tingbólkinum og ikki skal umboða flokkin alment? Hví hendir tað ikki? Ber til at hava álit á Tjóðveldisflokkin, tá hann tekur eina avgerð, men ikki fremur hana í verki?

Hesar - og aðrar líknandi - spurningar havi eg fingið aftur og aftur, síðan eg hóskvøldið varð stillaður upp til fólkatingsvalið á tjóðveldislistanum.

Fólk hava ikki hug at tosa um politisk avrik og ætlanir - men øll hava eina støðu til stríðið um Tórbjørn Jacobsen.

Tað er einki dulsmál, at hetta er sera skaðiligt fyri flokkin og okkum, ið eru uppstillað. Tí vit hava nógv fleiri úrslit at vísa á, enn nakar annar. Vit hava nógv greiðari ætlanir, enn nakar annar. Og vit eru einasti flokkur, sum fer at standa púra óheftur á fólkatingi og tala søk Føroya.

Men tað hevur lítlan áhuga - alt druknar í tí óvirðiliga persónliga stríðnum. Og tað er øgiliga frustrerandi - serliga tá tú í trý ár hevur arbeitt á fólkatingi við góðum úrsliti.

**Skilji tað væl**

Men eg skilji tað væl.

Tað er ein royndur lutur, at atburðurin hjá Tórbirni ikki hevur verið nakað prýði fyri flokkin. Og tann vingluti mátin, floksleiðslan hevur handfarið málið uppá, hevur ikki verið álitisvekjandi. Tað er eisini greitt, at tá ein avgerð verður tikin, men ikki verður framd í verki, so skaðar tað trúvirðið floksins.

So eg skilji tey, sum eru óð, ørkymlað og sum enntá venda flokkinum bakið. Eingin annar flokkur hevur jú tosað meir um prinsipp og støðufesti enn júst Tjóðveldisflokkurin.

**Veljarin fær orðið**

Men eg haldi kortini, at tey, sum gjørdu av, at Tórbjørn skuldi á listan, gjørdu rætt.

Alt vald stavar jú frá veljaranum. Veljarin skal altíð hava bæði fyrsta og síðsta orðið. Og við fólkatingsvalinum fekk flokkurin ein møguleika at lata veljaran siga sína meining um atburðin og álopini hjá Tórbirni. Øll álopini standa jú við - Tórbjørn hevur einki tikið aftur.

Eg haldi tað vera ein greiðan fyrimun, at veljarin fær høvi at geva sína hugsan til kennar um hendan atburð og hesi álop.

Var Tórbjørn ikki á listanum, slapp veljarin ikki at siga sína hugsan um alt rokið - og so kunnu vit bara hugsa okkum, hvat tað hevði havt við sær av ákærum og illgitingum.

At leggja støðuna fyri veljarans dóm, kann aldrin vera skeivt - hóast tað krevur, at nøkur prinsipp verða nakað boygd. Prinsippið um, at veljarin skal sleppa at fella dóm, er hóast alt týdningarmesta politiska prinsipp, ið finst.

Men eg vóni, at tað, fólk fara at fella dóm yvir 8. februar, fyrst og fremst verða politisk avrik og politiskar ætlanir. Tí so vinna vit valið so spælandi...

## Gjald fyri valgreinar

Tað er nú greitt, at fólkatingsval verður 8. februar í ár. Eins og tað hevur verið vanligt í tíðini fram til eitt val, fer Sosialurin aftur hesa ferð at taka pengar fyri valgreinar, sum verða settar í blaðið.

Enn er freistin fyri at lata vallistar inn ikki lokin, men frá og við Vikuskiftisblaðnum komandi fara vit at taka pening fyri greinar, sum beinleiðis eru tengdar at valstríðnum. Gjaldið fyri valgreinar er helvtin av vanligum lýsingarprísi.

**Sosialurin**